Semja

millum

Føroya Arbeiðsgevarafelag / Føroya Handverksmeistarafelag

og

Føroya Handverkarafelag / Landsfelag Handverkaranna

Omanfyri nevndu partar eru samdir um at leingja galdandi sáttmálar til 1. oktober 2018 við niðanfyri standandi broytingum:

**Í høvuðssáttmálanum verða hesar broytingar gjørdar**:

**1.** Lønin hækkar soleiðis:

| | |
|---|---|
| 1. oktober 2016 | 2,2 % |
| 1. oktober 2017 | 2,3 % |

**2.** Í § 3 verður soljóðandi nýtt stk. 3 sett inn:

"*Verður handverkari, sum hevur arbeitt hjá sama meistara í meira enn 9 mánaðir út í eitt, óarbeiðsførur orsakað av einum arbeiðsskaða, sum er arbeiðsskaði sambært arbeiðsskaðatryggingarlógini, hevur arbeiðsgevari, aftaná at tíðarskeiðið í stk. 1 er endað, skyldu at rinda munin millum dagpeningaveitingina og vanligu lønina, sum handverkara hevði fingið útgoldna, um viðkomandi ikki fekk skaðan.*

*Gjaldsskyldan hjá meistara stendur við inntil handverkari aftur er arbeiðsførur tó í mesta lagi 4 mánaðir aftaná, at arbeiðsskaðin er hendur.*"

**3.** Í § 4 verður stk. 2 og stk. 3 broytt at vera soljóðandi:

"*Stk. 2. Uppsagnartíðin er*
- *5 arbeiðsdagar fyri starvstíð meira enn 3 mánaðir*
- *10 arbeiðsdagar fyri starvstíð meira enn 6 mánaðir*
- *20 arbeiðsdagar fyri starvstíð meira enn 2 ár*
- *30 arbeiðsdagar fyri starvstíð meira enn 5 ár*

*Stk. 3. Uppsagnartíðin er galdandi fyri báðar partar. Uppsøgnin skal vera skrivlig fyri báðar partar. Brot móti hesum verður sektað við ávikavist fyri handverkara við missi*

*av dagslønum svarandi til helvtina av uppsagnartíðini og fyri meistara við at gjalda somu upphædd.*"

Eisini verður soljóðandi nýtt stk. 4 sett inn:

"*Verður handverkari, sum hevur arbeitt hjá sama meistara í meira enn 9 mánaðir út í eitt, óarbeiðsførur orsakað av einum arbeiðsskaða, sum er arbeiðsskaði sambært arbeiðsskaðatryggingarlógini, kann viðkomandi ikki sigast úr starvi fyrr enn 6 mánaðir, aftaná arbeiðsskaðin er hendur. Hetta er tó bert galdandi, inntil handverkari aftur er arbeiðsførur.*"

**4.** Í § 15 verður viðbótin í stk. 1 broytt til 1,5 %, viðbótin í stk. 2 broytt til 0,5 % og viðbótin í stk. 3 broytt til 10 %.

**5.** Protokollatið eftir § 23 verður strikað.

**6.** Í § 26, stk. 2 verður "*1 mánaði*" broytt til "*3 mánaðar*".

**Í lærlingarsátttmálanum verður henda broyting gjørd:**:

**7.** Í § 8 verður "*32%*" broytt til "*35%*"

**8.** Soljóðandi nýggj § 10 verður sett inn:

"**§ 10 Koyring og burturarbeiði**
*§ 19 í høvuðssáttmálanum um koyring og burturarbeiði hjá handverkarum og serarbeiðarum er eisini galdandi fyri lærlingar.*"

Fylgjandi greinar broyta nummar samsvarandi hesum.

Tórshavn, 7. november 2016

Fyri Føroya Arbeiðsgevarafelag
Marita Rasmussen, samráðingarleiðari

Fyri Føroya Handverksmeistarafelag
Magnus Magnussen, formaður

Fyri Føroya Handverkarafelag
Suni Simonsen, formaður

Fyri Landsfelag Handverkaranna
Daniel Pauli Djurhuus, formaður